## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
Tann fullkomni sonurin – amerikanskur filmur, **01.** ***(21.20)***
The man who Loved Cat Dancing – am. Kovboyfilmur, **01.** ***(22.50)***
Fýra brúdleyp og ein jarðarferð – am. kærleiksf., **02.** ***(20.25)***
Seinasta tølanin – amerikanskur spenningsfilmur, **02.** ***(22.20)***
The Great Gatsby – am. filmur, **03.** ***(16.00)***
Gloym meg ei – amerikanskur aut. Filmur, **03.** ***(20.45)***
Pumping Iron – am. dok. filmur, **04.** ***(23.00)***
Sonur mín er fanatiskur – bretskur filmur, **05.** ***(21.40)***

**3+**
Freedom Song, **06.** ***(19:00)***
Hetta er mín familja, **05.** ***(19:00)***
Slappy og lortaungarnir, **02.** ***(19:00)***
Snjóhvíta, **01.** ***(19:00)***
Tað at selja tjóvaríalarmar, **02.** ***(20:35)***
Vandamikil impulsur, **06.** ***(21:10)***
Wolf, **07.** ***(21:05)***

**BBC Prime**
Kvinnuharkaliðið, **04.** ***(20:00)***

**Canal+**
American Flyers, **04.** ***(20:00)*** **05.** ***(11:00)*** **07.** ***(0:45)***
D-Tox, **01.** ***(20:00)***
Gev tað víðari, **03.** ***(4:00)*** **07.** ***(15:10)***
Hendrix, **03.** ***(21:05)***
Lívstekin, **02.** ***(23:30)***
Pollock, **02.** ***(20:00)*** **03.** ***(8:30)***
Short Cuts: Kids, **07.** ***(22:10)***
Short Cuts: Space Out, **01.** ***(8:25)***
Sjálvmorðsáttmálin, **05.** ***(20:00)*** **07.** ***(13:35)***
Star Trek: The Motion Picture, **07.** ***(20:00)***
Suddenly Naked, **06.** ***(20:00)*** **07.** ***(8:40)***

**Canal+Blå**
Fýra óvinniligir stríðsmenn, **01.** ***(20:35)***
Hendrix, **07.** ***(15:05)***
Lívstekin, **04.** ***(22:20)***
Red Planet, **03.** ***(6:00)*** **06.** ***(15:40)***
Trixie, **01.** ***(22:55)***

**Canal+Gul**
American Flyers, **06.** ***(7:25)***
Another Life, **01.** ***(1:55)***
Ein heppin nøs, **01.** ***(22:20)***
Eitt glimt av helheimi, **01.** ***(13:10)***
Gullsmiðurin, **01.** ***(0:05)***
Pollock, **04.** ***(9:40)*** **06.** ***(20:30)***
Tíggju stuttar kærleikssøgur, **01.** ***(6:00)***

**DR 1**
Columbo, **02.** ***(20:50)***
Katastrofa fyri framman, **03.** ***(20:40)***
Kjarnorkutokið, **04.** ***(20:30)*** **05.** ***(20:30)***
Pelikan skrivið, **01.** ***(20:30)***
Rekrut 67 Petersen, **02.** ***(19:30)***

**DR 2**
Carrington, **03.** ***(19:30)***
Ferðin til Nashville, **07.** ***(19:30)***
Ljósareyði pantarin slær aftur, **01.** ***(19:50)***

**Hallmark**
After The Glory, **03.** ***(6:45)***
Alone in the Neon Jungle, **05.** ***(20:00)***
Conundrum, **02.** ***(21:00)***
Frame Up, **01.** ***(20:00)***
Grand Larceny, **01.** ***(6:45)***
Out Of Ashes, **03.** ***(21:00)***
Roxanne: The Prize Pulitzer, **04.** ***(20:00)***
The Baron and the Kid, **02.** ***(6:45)***
Trouble In Paradise, **06.** ***(23:15)***

**TCM**
20.000 ár í Sing Sing, **05.** ***(7:55)***
Old Acquaintance, **04.** ***(23:40)***
Skøkjan úr Damaskus, **02.** ***(16:30)***

**TV 2 zulu**
Deyðsspælið, **03.** ***(23:25)***
Dick, **06.** ***(19:30)***
Vandamikið forelskilsi, **04.** ***(19:00)***

**TV 3**
Beaver klárar ertrarnar, **02.** ***(20:00)***
Úlvahundurin 2, **02.** ***(12:55)***

**TV-1000**
$windle, **01.** ***(19:00)***
29 Palms, **06.** ***(19:00)***
Bíblian: Apokalypsan, **07.** ***(19:00)***
Con Air, **04.** ***(19:00)***
Forbanningin av skorpiónini, **02.** ***(19:00)***
Fremmandalegionin, **01.** ***(3:50)***
Heartbreakers, **03.** ***(21:00)***
Lítlir detektivar, **01.** ***(7:10)***
The Bunker, **02.** ***(2:20)***
Watchtower, **03.** ***(19:00)***
What Women Want, **02.** ***(21:00)***

**TVDanmark1**
Blóðreyð dimmi, **01.** ***(21:20)***
Eingin vegur út, **02.** ***(21:05)***
F/X vandamikil trix, **02.** ***(23:00)***
For Hire, **04.** ***(20:00)***
Krigsmaðurin, **03.** ***(2:00)***
Sucker, **07.** ***(20:00)***
The Bad Pack, **06.** ***(20:00)***

**TVDanmark2**
Forritaður til morð, **05.** ***(11:20)***
Fráfaringarstundin, **04.** ***(11:20)***
Playback, **01.** ***(11:20)***
Stríðið fyri Andrew, **02.** ***(18:55)***
Trúgv og kærleiki, **06.** ***(11:20)***
Vandamikið forhold, **03.** ***(19:15)***
Við vindinum í rygginum, **07.** ***(11:20)***

**Fríggjadag 01. kl. 18.30**



### Frasier
Mel fær Niles til at stilla upp til valið av einum forkunnugum heiti í vínklubbanum ímóti Frasier. Og Niles vinnir. Áðrenn valið hevur Frasier tilrættislagt eina veitslu fyri Mel, so hon kann kenna seg betri í klikuni. Tá Mel er farin heim, spyr Niles hini um teirra meining um Mel - teirra meining yvirraskar hann.

**Fríggjadag 01. kl. 18.55**




### David Beckham
David Beckham hevur júst skift til yvir til Real Madrid frá barndómsfelagnum Manchester United. Ein enska dokumentarsending hugdi nærri at tí táverandi enska liðskiparanum. Beckham fór fyrstu ferð á vøllin fyri besta liðið hjá Manchester United í 1995, tá var hann 19 ár. Nú hevur hann spæltumleið 400 dystir og 60 fyri landsliðið.

**Fríggjadag 01. kl. 20.55**



### The man who Loved Cat Dancing
Tá ið Catherine verður burturflutt av fýra ránsmonnum, noyðist hon at sanna, at tað ikki loysir seg at leggja upp í tokrán. Hon er rýmd frá manninum, sum nú, saman við øðrum, ið tokfelagið hevur leigað, jagstrar ránsmenninar, fyri at fáa peningin aftur.

**Fríggjadag 01. kl. 20.00**



### Parkinson
Prát-undirhaldssendingin við sera fólkakæra Parkinson. Hesuferð eru gestirnir Hollywood superstjørnan Tom Hanks og David Bowie. Tvey kend nøvn innan, ávíkavíst, filmheimin og tónleikaheimin. David Bowie hevur eisini spælt við í størri filmum.

**Leygardag 02. kl. 20.00**



### Pollock
Jackson Pollock bleiv størsta listastjørnan í USA. Hansara radikali málarastílur broytti hugburðin til modernaða list. Men Pollock var støðugt plágaður av iva um síni evnir. Ed Harris er í høvuðsleiklutinum og debuterar sum instruktørur.

**Leygardag 02. kl. 20.25**



### Fýra brúdleyp og ein jarðarferð
Charles, sum er 32 ára gamal og ógiftur, hættar sær ikki at knýta seg til eina kvinnu, men hann er samstundis ávirkaður av, at vinir hansara allir verða giftir. Hann fer í eitt brúdleyp fyri og annað eftir, men knappliga broytist alt, tá hann fær eygað á ta vøkru Carrie.

**Leygardag 02. kl. 21.40**



### Cliffhanger - á eggjuni
Ein bólkur av ránsmonnum hava mist eina millión í fjøllunum og teir noyða Gabe Walker, ein mountain-ranger, at hjálpa teimum at finna pengarnar. Gamli vinurin hjá Gabe, Hal Tucker, gerst greiðir yvir, at Gabe fer at verða dripin, beinanvegin aftaná at brotsmennirnir hava fingið pengarnar.

**Leygardag 02. kl. 22.00**



### Reputations: Janis Joplin
Drotingin yvir sex, rúsevnir og rock ´n´ roll bleiv uppdagað á The Monterry International Pop Festival í 1967 og hennara fyrsta pláta bleiv gull í 1968. Hon bleiv kend víða um, men bara tvey ár seinni doyði hon. Hendan sendingin gevur ein nærmynd av stjørnuni.

**Sunnudag 03. kl. 16.00**



### The Great Gatsby
Ungi Nick Carraway hevur leigað eini hús í einum ríkmannabýlingi. Tíðin er tjúguárini í USA. Nick verður skjótt hugtikin av lívsstílinum hjá nýggja grannanum Jay Gatsby, men Gatsby hevur eina duldarfulla fortíð.

**Sunnudag 03. kl. 20.00**



### Vandamikið tvíspæl
Í 1944 fær ein amerikanskur hernaðarovasti tey virðismiklu og topployniligu ætlanirnar fyri D-dagin. Men hesin verður tikin við Onglands strendur og ætlanirnar enda hjá fíggjundanum. Teir sameindu royna at finna eina loysn uppá kreppuna. Teir noyðast at senda ein mann inn.

**Sunnudag 03. kl. 20.00**



### Knock Out
Nevaleikararnir Vince(Antonio Banderas) og Cesar(Woody Harrelson) hava verið arbeiðsleysir í fleiri ár. Men brádliga verða teir ringdir upp av einum promotara, sum gevir teimum møguleikan at fara til Las Vegas at boksast í einum stórum dysti. Men tað er bara tað at teir skulu boksast móti hvør øðrum.

**Sunnudag 03. kl. 23.00**



### The Ice House
Eitt illa farið lík verður funnið í tí óbrúkta húsinum á Streech Grange og ein 10 ára gomul morðkanning verður aftur sett í gongd. Ovastin George Walsh og hansara ungi sersjantur Andy McCloughlin leiða kanningarnar. Verður hvørvanin av David Maybury endiliga avdúka?

**Mánadag 04. kl. 18.00**



### The Simpsons
Meðan Lisa og hennara klassavinir leiða ein útgrevstur verður ein beinagrind funnin. Beinagrindin hevur løgnan knoglabygnaði um akslarnar, so íbúgvarnir halda at hetta má vera restirnar av einum eingli.

**Mánadag 04. kl. 18.30**



### Frasier
Frasier og Roz luttaka í eini útvarpsráðstevnu, har tey verða noydd at deila rúm um kvøldið. Roz pyntar seg og okkurt romantiskt byrjar. Martin og Niles hjálpir Donny í einum máli um ein ótrúgvan ektamann. Tá hesin maðurin og so hansara elskarinna brádliga koma forbí, hendir alt skjótt og serliga Niles angrar, at hann blandaði seg uppí.

**Mánadag 04. kl. 20.00**



### For Hire
Dreymarnir hjá Mitch um at gerast til sjónleikara, verða ongantíð til nakað. Hann vinnur sær pengar sum hýruvognsførari. Einasta positiva í hansara gerandisdagi er hansara elskaða kona, ið er við barn. Ein dagin biðir ein av hansara kundum hann drepa ein narkoseljara og, tá so Mitch gerst varðugur við at hann hevur ólekjandi kreft, broytist alt.

**Mánadag 04. kl. 23.00**



### Pumping Iron
Hetta er ein amerkanskur dokumentarfilmur frá 1977 um risan Arnold Schwarzenegger, sum her bara pumpar og pumpar fyri at fáa heitið Mister Olympia. Arnold vil fegin hava lýtaleysan kropp.



**Týsdag 05. kl. 20.00**



### The Linda McCartney Story
Ein spenningssøga grundað á veruligu hendingarnar í 30 ára langa hjúnaðarbandinum hjá Paul og Lindu McCartney - frá teirra fyrsta møti til hennara deyða. Myndakvinna, Beatles hústrú, tamburinleikari, ein pionerur innan marknaðarføringina av vegetarmati: Linda McCartney livdi eitt ófatiligt lív.

**Týsdag 05. kl. 21.05**



### The Blackadder
Fyrstu skemtisendingarnar um tann klassiska og eitt sindur arroganta Blackadder. Blackadder er Edmund, Duke of Edinburgh, sonur Kong Richard IV og maðurin við einum av teimum ljótastu hárfrysyrunum í 15. øld.

**Týsdag 05. kl. 21.40**



### Sonur mín er fanatiskur
Parvez úr Pakistan koyrir hýruvogn í einum bretskum býi í Norðuronglandi. Tað mesta er náttarkoyring við skøkjum og viðskiftafólkum teirra, sum eru hansara bestu kundar. Við hús stendur ikki alt ov væl til heldur, tí konan er ónøgd við alt.

**Týsdag 05. kl. 22.20**



### Við húð og hár
Ensk dramarøð í sjey pørtum um vinir, sum næstan eru 30 ár, øll stríðast fyri kærleika, vinarlag og góðari yrkisleið. Emma gongur saman við Mark, men er forelska í beiggja hansara. Hvat ger hon so tá Mark biðir hana giftast við sær?

**Mikudag 06. kl. 18.00**



### The Simpsons
Homer hevur skuldina, tá ein tivoli-starvsmaður og hansara sonur missa teirra arbeiði. Homer bjóðar teimum báðum eitt stað at búgva. Men, tá teir læsa Simpson familjuna úti og siga at teir eiga húsið, roynir Homer við sínum snildum at lumpa teir, fyri at fáa húsið aftur.

**Mikudag 06. kl. 18.30**



### Frasier
Tá forlovarin hjá Donny kann ikki tilrættisleggja eitt polterabend fyri honum, traðkar Frasier til. Av misgávum verður ein politi-strippari leigaður, sum brádliga kemur inn til Frasier. Tá hann tekur hana, stripparan, inn í kamarið fyri at greiða henni um mistakið endar alt í eini miskiljing. Frasier endar sjálvur í hondjørnum.

**Mikudag 06. kl. 20.00**




### Myndlist í Føroyum (6)
Í 1933 málaði ein 15 ára gamal hegnigur leirvíksdrongur, Jóannis Kristiansen, eina vakra vatnlitamynd av heimbygdini. Sum ungur fór hann til Keypmannahavnar, og í 1944 kundi hann byrja á kunstakademinum. Sum frá leið gjørdist hann kendur í Føroyum sum Leirvíksmálarin.

**Mikudag 06. kl. 21.00**



### Anti-Trust
Milo er ein hugsjónskur ungur telduserfrøðingur við eini deiligari damu og eini bjartari framtíð. Hann ætlar at byrja eitt felag saman við vininum Teddy, men verður í staðin leigaður av NURV - ein milliard-fyritøka, átt av stóru fyrimyndini hjá Milo, Gary Winston.

**Hósdag 07. kl. 21.00**



### Desperado
Ein fremmandur, El Mariachi, kemur til ein meksikanskan bý. Í sínum gittarkassa hevur hann síni vápn. Hann leitar eftir einum narkokongi Bucho, sum drap hansara elskaðu konu. El Mariachi er óður eftir at fáa hevnt...

**Hósdag 07. kl. 21.05**



### Wolf
Tann miðaldrandi blaðstjórin Will Randall, verður eina náttina bitin av einum úlvi á einum oynnum landavegi. Stutt eftir byrja merkverdig ting at henda fyri honum - hoyrnin og luktisansurin verða ógvusliga styrktir og hansara illsinni við. Will er vorðin varúlvur, men veit tað ikki enn. Hansara nýggja dama, Laura, uppdagar at okkurt er rívandi galið.

**Hósdag 07. kl. 22.20**



### Jay Leno
Í fótsporum Steve Allen, Jack Paar og Johnny Carson fylgir Jay Leno, sum ein undirhaldandi late-night vertur. Í mei 2002 kundi hann hátíðarhalda 10 ára dagin fyri hansara serliga skemtiligu prátsendingar við kendum gestum. Gestir hesuferð eru: sjónleikarin Colin Farrell og tónleikarar eru B.B King og Jeff Beck.

**Hósdag 07. kl. 22.05**



### Tey kallaðu okkum hetjur
Eriksson hevur bara verið í Vietnam í tríggjar vikur, tá hann verður fangaður í eina fellu í Viet Cong tunnlinum. Meðan Eriksson stríðist við at gerast leysur kemur ein fíggindi og skal gera av við hann, júst tá kemur Meserve kemur honum til bjargar. Lagið í herdeildini er sera ringt og umstøðurnar eru sera vánaligar.

**Leygardag 26. kl. 16.00**

### Tilvera: Sólin skínur í trettan mánaðir
Elsa Jacobsen úr Gøtu er útbúgvin sjúkrasystir og jarðamóður. Hon fekk eitt kall at vera trúboðari og hevur í 31 ár arbeitt í Etiopia. Elsa hevur upplivað sera nógv har. Trúarfrælsi var, meðan Hailie Selassie ráddi fyri borgum, men tá kommunistarnir tóku yvir, sluppu trúboðarnir ikki at virka frítt. Andatrúgvin er sterk í Etiopiu, og fólkið hevur nógvar ræðandi siðir. Armgarð Arge hittir Elsu Jacobsen í tveimum sendingum.

**Leygardag 26. kl. 17.00**

### Sjómanssendingin Vitin
Gesturin er Kristoffur Joensen av Argjum. Hann er føddur og uppvaksin í Sørvági, og vit hoyra hann siga frá um barna- og ungdómsárini.
Hann fór ungur til skips og hevur upplivað nógv á havinum. Hann fekk sær konu av Argjum og hevur livað og virkað har síðani.
Hann er ein av teimum fðra sum syngja saman uttan nakað ljóðføri. Árini eru blivin mong, men framvegis er Kristoffur við í tænastuni fyri okkara Harra og Frelsara.

Malmberg Olsen gjørdi samrøðuna. Símin Hansen leggur sendingina til rættis.

**Sunnudag 27. kl. 15.15**

### Ímyndin av øllum møguligum góðum
Triðja sendingin verður um tíðina í Fuglafirði og ótespiligar læknaferðir, tá ansast skuldi eftir brimi, kava og tarvum.

**Ólavsøkuaftan 28. kl. 13.00**



### Eg minnst úr gomlum søgum
Eg minnist úr gomlum søgum, sum Jákup doktari, Jóannes Patursson, Hans Marius Debes og Valdemar Poulsen siga frá, um hendingar o. a. í Havn í gomlum døgum. Her verður sagt frá, tá ið Guttormur í Múla fekk ein hana at bera ein tólvalnastokk, tá Fríðrikkur 7. táverandi prinsur royndi seg sum køstaskoðara, um ommuna, ið fór til Havnar at halda ólavsøku, og hvussu teir telvaðu í Avhaldinum í takt til hornblástur.

Høgni Joensen og Bjørgfinnur Nielsen lesa.

**Ólavsøkudag 29. kl. 15.45**

### Jovina og Lýðar á Ólavsøku
Henda frásøgn er bygd upp av skemtiligum málsligum misskiljingum, og um hvussu ein tufluhetja tíggjar sær, tá konan ikki er í nánd, og hvussu alt tað stuttliga endar við, at Lýðar verður sjubbarður í song av tveimum konum og latin úr næstum hvørjum tráði.

Bjørgfinnur Nielsen lesur og leggur til rættis

## Ítróttur

Leygardagin kl. 15.00
SAS-ligan: FCK-OB
Sunnudagin kl. 12.00
Formel 1 av Hockenheim, Týsklandi
Sunnudagin kl. 16.00
SAS-ligan: Frem-Brøndby

Golf Scandinavian Masters úr Barsebäck, Svøríki

Frælsur ítróttur úr Linz, Eysturríki
Frælsur ítróttur úr London, Onglandi
Súkkling úr Stuttgart, Týsklandi
U-19 fótbóltur ur Týsklandi
Beachvolley úr Klagenfurt, Eysturríki
WTA-Tennis úr San Diego, USA
Cart úr Elkhart Lake, USA
Fótbóltur, vinardystir

Badminton HM
Fótbóltur, Amsterdam Cup
Súkkling, HM
Frælsur ítróttur úr Stockholm, Svøríki

Fríggjadagin kl. 19.25
Bundesliga: Bayern München-Frankfurt
Leygardagin kl. 13.55
Bundesliga: Schalke 04-Borussia Dortmund

Formel 3000 av Hockenheim, Týsklandi
Golf, Buick Open

**VARPIÐ**

Eykablað í Sosialinum hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin